# Ongin vilji til nakað sum helst

*Føroya Lærarafelag góðtekur ikki, at limir tess skulu lata burturav teirra løn fyri at gjalda kostnaðin av nýggju fólkaskúlalógini, sigur Føroya Lærarafelag m.a. í tíðindaskrivi um íkomnu støðuna*

Eftir at Føroya Lærarafelag hevur givið bæði Fíggjarmálastýrinum og Undirvísingar- og mentamálastýrinum eitt skotbrá upp á meira enn eitt hálvt ár (semjan frá 31. oktober 1999) til at finna út av, hvussu fólkaskúlalógin skal fylgjast og setast í verk, mugu vit tíverri ásanna, at hjá myndugleikunum er ongin vilji til nakað sum helst.

Føroya Lærarafelag góðtekur ikki, at okkara limir skulu lata burturav teirra løn fyri at gjalda kostnaðin av nýggju fólkaskúlalógini.

Á fundinum í dag varð sagt, at landsstýrismaðurin í fíggjarmálum, Karsten Hansen, ikki vil gjalda fyri 50 nýggj lærarastørv í fólkaskúlanum.

Hetta er tað, sum myndugleikarnir vænta kemur burturúr, um krøvini hjá Føroya Lærarafelag viðvíkjandi tí meira álagda arbeiðinum, verða gingin á møti.

Annars varð eisini sagt, at landsstýrismaðurin í undirvísingarmálum, Signar á Brúnni, hevur boðað frá, at tann nýggja fólkaskúlalógin áleggur lærarunum ikki meira arbeiði, og tískil kostar hon ikki meira.

Á fundinum í dag varð sagt frá Karsten Hansen, landsstýrismanni í fíggjarmálum, at um Føroya Lærarafelag hevur rætt, so má fólkaskúlalógin heldur niðurprioriterast ella broytast.

Tað er hetta, sum skilir partarnar í samráðingunum.

Vit hava roynt at fáa tingingarnar á glið, men til fánýtis. Parturin hjá Føroya Lærarafelag liggur ikki eftir.



*Mynd: Jens Kr. Vang*

# Hatta havi eg ikki sagt

*Signar Á Brúnni skilir ikki útsøgnirnar hjá Føroya Lærarafelag um, at hann skal hava sagt, at nýggja fólkaskúlalógin ikki áleggur lærarunum meira arbeiði. – Verður verkfall, so er tað ein katastrofa, sigur Signar á Brúnni, sum vónar loysn á málinum*



*Hendir ólukkan, og verkfall verður, so siti eg við Svarta Per og ikki Fíggjarmálastýrið, ásannar landsstýrismaðurin í undirvísingar- og mentamálum Signar á Brúnni, sum tó hevur vónir um, at partarnir finna eina loysn*

Dagfinn Olsen

Signar á Brúnni skilir ikki, hví Føroya Lærarafelag førir fram, at hann skal hava sagt, at nýggja fólkaskúlalógin áleggur ikki lærarum meira arbeiði.

– Tað, sum eg havi sagt alla tíðina, bæði tá lógin kom fram og undir viðgerðini er, at stóri brølarin er, at lógin var ikki nóg greidliga lýst, tá hon kom fram, t.d. hvør kostnaðurin kom at verða av løggávuni. Har er trupulleikin.At arbeiðsbyrðan er økt, er einki at taka seg aftur í, sigur Signar á Brúnni.

– Eg veit ikki, hvaðani Lærarafelagið hevur hetta. Eg havi sagt tað øvugta, bæði fyri lærarafelagnum og tá seinastu samráðingar vóru og eg sigi tað eisini nú. Eg havi ongantíð sagt, at nýggja lógin ikki áleggur lærarum meira arbeiði, sigur Signar á Brúnni.

Hann sigur, at hann serliga hevur gjørt vart við, at skúlaleiðslurnar fáa økta arbeiðsbyrði, oman á alt tær hava frammanundan, og fáa eiki fyri tað.

## Svarti Per

*Fíggjarmálaráðharrin Karsten Hansen hevur ført fra, at kostar lógin so nógv, so má hon broytast. Hvørja viðmerking hevur Signar á Brúnni til hetta?*

– Tað kann ein siga. Eg eri samdur við Karsten Hansen so langt, at tá lógin varð samtykt, so vantaði nakað, nevniliga fíggjarligu avleiðingarnar. Men at seta eina lóg í gildi og síðani avtaka hana aftur, tí hon kostar ov nógv, tað er ikki seriøst, heldur Signar á Brúnni.

Hann heldur, at nógv gott og spennandi er í lógini og at tað verður ringt at fara at broyta lógina aftur.

– Eg skal ikki siga, hvar trupulleikin liggur í steðgaðu samráðingunum millum Fíggjarmálastýrið og Føroya Lærarafelag, men eg vóni innilga, at partarnir semjast, tí tey, sum líða undir einum verkfalli, eru børnini og foreldrini, sum eru ósek, og eg haldi ikki tað er heppi fyri lærararnar, at fara út í verkfall. Tí vóni eg, at partarnir gera alt teir kunnu, fyri at sleppa undan verkfalli, tí tað verður ein katastrofa, tí allur skúlin liggur lamin og einki skil verður á, heldur Signar á Brúnni.

Signar á Brúnni ásannar, at tað er ein løgin støða at sita uttanfyri og sum landsstýrismaður í skúlamálum ikki vera partur í málinum.

– Samráðingarnar eru millum Fíggjarmálastýrið og Lærarafelagið. Men kemur tað til skúlapartin, so koma vit inn. Hendir ólukkan, og verkfall verður, so siti eg við Svarta Per og ikki Fíggjarmálastýrið, ásannar Signar á Brúnni, sum tó hevur vónir um, at partarnir finna eina loysn.

# Verður verkfall, mugu vit taka tað við

*Ein eigur at fyrireika seg uppá, at møguleikin fyri verkfalli er til staðar, sigur Karsten Hansen, sum tó væntar semju*



*- Ein kann gjalda seg frá øllum, men so stendur ein eisini eftir við tómum kassa til síðst, vísir Karsten Hansen á.*

Dagfinn Olsen

Karsten Hansen, fíggjarmálaráðharri, vísir í samband við slitnaðu sáttmálasamráðingarnar millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálastýrið á, at nýggja fólkaskúlalógin longu hevur kostað tvær ferðir so nógv, sum sagt var í byrjanini.

– Nú skulu so bara lønirnar kosta 18 milliónir afturat, umframt 50 lærarastørv. Tað er ikki tað, sum løgtingið samtykti, tá lógin kom ígjøgnum í løgtinginum, sigur Karsten Hansen.

- Vit hava samráðst um lønir og lærararnir hava fingið sama tilboð, sum onnur hava fingið. Teir vísa á, at størri ábyrgd og meira arbeiði er lagt á, men tað hendir dagliga, tá broytingar henda í samfelagnum. T.d. á Gjaldstovuni og Tolli og Skatti, men ein hækkar ikki lønirnar fyri tað, sigur Karsten Hansen.

– Lærarar vilja, at nú skulu teir undirvísa 2 tímar færri um vikuna, enn gjørt verður nú, og so nýta tíð til fyrireiking og annað, men so má ein spyrja, um tað er tað, løgtingið vil, tí hetta kostar nógv, sigur Karsten Hansen

*Men kanst tú liva við verkfalli og blokadu, sum felagið hevur lýst við?*

– Nú er tað bert 1/3, sum kann fara í verkfall,tí restin eru tænastumenn og hava ávísar skyldur.So velst um blokadu. Gera tænastumenn ikki sínar skyldur, so hava teir ein heilt annan trupulleika, vísir Karsten Hansen á.

*Um 1/3 av foreldrunum má ganga heima, tí børnini ikki sleppa í skúla?*

- Tað er ikki mítt borð, tí tá kemur annar landsstýrismaður inn í myndina, sum er vitandi um, at tað kann enda við verkfalli og ein eigur at fyrireika seg uppá, at møguleikin er til staðar. Men eg trúgvi uppá, at vit finna eina semju. Havandi í huga aðrar partar á arbeiðsmarknaðinum kann eg ikki siga, at sjálvsagt skulu lærarar hava meira enn onnur, sigur Karsten Hansen.

Lærarafelagið hevur ført fram, at lønardeildin hjá Fíggjarmálastýrinum stendur fast við sítt.

– Nú skal ein ikki gloyma, at lærararnir eisini standa rímiliga fastir. Ósemja var jú í heyst og tá høvdu teir eisini boðað frá verkfalli, men tað bleiv so ikki. Hetta er vaksið fólk og eg trúgvi og vóni, at ein loysn verður funnin. Um ikki, so mugu vit taka tað við, tí tey hava rætt at fara í verkfall, men tað er altíð harmiligt, tá so er, sigur fíggjarmálaráðharrin.

- Ein kann gjalda seg frá øllum, men so stendur ein eisini eftir við tómum kassa til síðst, vísir Karsten Hansen á.



# Nýggj vindeygu í Vatnsoyrum

*Vatnsoyra Snikkaravirki skipar fyri sølufremjandi upplýsingartiltakið á Hotel Vágum. Endamálið er at marknaðarføra H-vindeygað í nýggjum sniði*



*Hans Elmar Poulsen, Heðin Poulsen, Dánjal Pauli Poulsen og Berg Rasmussen*

Edvard Joensen
Myndir: Jens Kr. VAng

Góða, gamla, vælkenda H-vindeygað fær nú nýtt snið. Gamla vindeygað í nýggja búnanum verður marknaðarført á Hotel Vágum í hesum døgum.

Vindeygað, sum melur innan í rammuni, hevur verið gjørt úr timbri øll árini. Men nú fer Vatnsoyra Snikkaravirki at klæða timbrið við aluminiumi uttan. Eisini verða liggivindeyguni broytt soleiðis, at nú fer at bera til at lata tey upp eftir síðuni, soleiðis at ramman kann læsast í eini støðu, har vindeygað stendur sum eitt vanligt vindeyga við hongslum. Tó ber til at fara víðari soleiðis, at ramman melur runt og tað, sum vendi út, vendir inn.

Eisini verður sjálv útsjóndin broytt nakað, sigur Heðin Poulsen, stjóri á Vatnsoyra Snikkaravirki.

H-vindeygað, ella Husmor, sum tey flestu kenna tað, verður gjørt á Vatnsoyra Snikkaravirki. Og nú vindeygað fær eina andlitslyfting, verður skipað fyri upplýsingartiltaki fyri teimum, sum dagliga selja og arbeiða við vindeyganum.

Heðin Poulsen, sigur, at teir hava valt at bjóða serligum áhugabólkum til hetta tiltakið. Slíkum sum timburhandlum, byggimeistarum, arkitektum o.s.fr. Hetta tí roknað verður við, at hesi hava eina meining um vindeygað og kanska okkurt gott ráð eisini.

## Økt kapping

Hóast H-vindeygað í áravís hevu verið brúkt í Føroyum, er neyðugt at hava slík tiltøk av og á, sigur Heðin Poulsen. Marknaðurin skal røkjast alla tíðina, og kappingin, sum altíð hevur verið, er bara harnað seinnu tíðina.

Vatnsoyra Snikkaravirki eigur eisini plastvirkið Føroya Glugga í Miðvági, har tey gera plastikvindeygu. So tey í Vatnsoyrum eru rættiliga væl við, tá tað ræður um at síggja nakað út.

Heðin Pouslen sigur, at tey hava merkt økta kapping seinnu árini, nú síðan Internetið rættiliga er komið í drift. Líkt er til, heldur hann, at fólk leita á Netinum og har finna eitthvørt, sum fæst til lagaligar treytir.

Men hann skundar sær at leggja aftrat, at tað ofta vísir seg at hanga okkurt annað uppi við lágar prísir. Ein týðulig ábending á, at dygdin er ikki tann, hann heldur Vatnsoyra Snikkaravirki vera ført fyri at geva.

Stjórin á Vatnsoyrar Snikkaravirki sigur, at hann kundi hugsað sær at vitað, hvar virkið flýtur í mun til samlaðu vindeyganýtsluna í landinum. Hann hevur roynt at fáa tøl, sum vísa nýtsluna, men tað ber ikki til, sigur hann. Tað einasta, atkomiligt er, eru nøkur tøl frá Hagstovuni, sum siga, hvussu nógva vekt av vindeygum, føroyingar flyta inn árliga.

»Og tað kann ikki brúkast til so nógv«, heldur Heðin Poulsen.

Av tí sama er ilt at meta um, hvørt virkið hevur størri ella minni part av samlaðu søluni.

Heðin Poulsen sigur tó, at í 1999 var ein rímuligur vøkstur í mun til 1998. Framleiðslan av plastikvindeygum vaks við 18%, meðan tað vórðu gjørd 24% fleiri timburvindeygu í 1999 í mun til 1998.

## Framtakið

Upplýsingarframtakið, Vatnsoyra Snikkaravirki skipar fyri um dagarnar, er sjálvandi ætlað sum sølufremjandi, sigur Heðin Poulsen, stjóri á Vatnsoyra Snikkaravirki. Hann sigur, at virkið fyrr hevur verið við á ymsum sølustevnum. Men tá hevur tað sjálvandi verið undir treytum, tey ikki sjálv hava rátt fyri.

Hesaferð hava tey valt at hava eina meira »ekslusiva« kunning, har høvið verður hjá fakfólki at fáa nágreiniliga kunning við rundvísing og fyrilestrum. At tað eru fakfólk, sum siga frá, ger fyrilestrarnar nokk so tekniskar, og av tí sama høvdu teir kanska verið óáhugaverdir hjá vanligum fólki, heldur Heðin Poulsen.

Gunnar Hoydal, arkitektur, hugleiðir um gluggar, glas og vindeygu í føroyskari bygging upp gjøgnum tíðina.

Slíkar hugleiðingar kunnu sveima víða, og Heðin Poulsen greiðir frá, at Gunnar í sínum fyrsta áhugaverda innleggi millum annað var ein túr framvið, tá glasið varð uppfunnið.

Eitt vindeygað er sjálvandi ikki bara ramman, so stjórin á Termovirkinum í Havn, Djóni Ziska er eisini við og sigur frá muninum millum vanligar termorútar og og orkurútar. Serliga við atliti at fyrimununum við hesum seinnu.

Vatnsoyra Snikkaravirki hevur øll árini gjørt vindeyguni í samstarvi og við loyvi frá fyritøkuni Spilka as í Ålesund. Nú nýggja sniðið er komið á marknaðin, er leiðarin á menningardeildini hjá Spilka komin til Føroya at greiða frá hesi nýggju vøruni.

Heðin Poulsen, stjóri á Vatnsoyra Snikkaravirki sigur, at virkið hevur gjørt íløgu í eina sproytuskipan, soleiðis at nú sleppa tey undan at mála rammurnar. Hann hevur ikki hug at seta tal á íløguna, men sigur tó, at hon er stór í teirra verð.





